# »Ættleiðingar-felagið« stovnað

*- Ættleiðingarforeldur hava ofta havt ta fatan, at tað vendist ikki aftur, um eitthvørt álvarsamt ella óheppið er hent teirra ættleidda barni, áðrenn tey fingu tað. Ivaleyst ávirkar slíkt onkusvegna, men tað verður ikki longur fatað, sum ein ófrávíkiligur dómur yvir barnið, og tað uggar sjálvandi ættleiðingarfamiljur, sigur Poul Geert Hansen*



**Leygardagin var stovnandi aðalfundur hjá føroyska ættleiðingarfelagnum. Felagið fekk navnið "Ættleiðingarfelagið", og hevur sum endamál at skapa bestu umstøður fyri ættleiðingarforeldur, ættleidd børn og vaksin**

AÐALFUNDUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Í nevndina í nýggja ættleiðingarfelagnum komu Annika Marr Poulsen, Marianna Heinesen, Ann Lindberg, Pól Skarðenni og Poul Geert Hansen. Tiltakslimir eru Bent Albinius og Laila á Lofti og grannskoðarar eru Sonja Mørkøre og Mary Ann Hansen.

Umleið 100 fólk, bæði ættleiðingarforeldur og børn teirra, vóru við á stovnandi aðalfundinum.

### Serlig viðurskifti

Ætlanin við nýggja felagnum er ikki at seta ættleidd børn í fokus, sum øðrvísi enn onnur børn. Men sjálvt um tað at vera ættleiðingarfamilja er meir vanligt í dag í mun til áður, er tað í ávísum førum framvegis nakað serligt. Tað var ein av orsøkunum til, at ein mammubólkur í Havn tók stig til at stovna eitt ættleiðingarfelag. Ymiskir spurningar, sum komu undan kavi í mammubólkinum, sannførdu tær um, at ættleiðingarfamiljur hava stóran tørv á at hittast og tosa um viðurskifti, onnur ofta ikki kunnu seta seg inn í.Felagið hevur tí eisini gjørt ein lista yvir fólk í Føroyum, ein kann venda sær til í sambandi við ættleiðingarspurningar og ivamál.

### Politiska ávirkan

Felagið hevur eisini sett sær fyri at royna at ávirka politisku leiðsluna soleiðis, at umstøðurnar fyri ættleiðing og lógarsmíð hesum viðvíkjandi kunnu gerast betri.

- Eitt nú er Haag konventiónin viðvíkjandi altjóða ættleiðing ikki galdandi fyri Føroyar. Hetta hevur millum annað við sær, at tað eru nøkur lond, ið ikki vilja ættleiða børn til Føroyar. Tí stendur ein føroysk samtykt av Haag konventiónini ovaliga á skránni hjá Ættleiðingarfelagnum, sigur Poul Geert Hansen, nevndarlimur.



*Annika Marr Poulsen er ein av stigtakarunum til Ættleiðingarfelagið. Hon kom í nevndina saman við Marionnu Heinesen, Ann Lindberg, Pól Skarðenni og Poul Geert Hansen. Tiltakslimir eru Bent Albinius og Laila á Lofti*

### Endurskoðað ástøði.

Skráin fyri aðalfundin var annars sera fjølbroytt, og eitt av meir forvitsligu innsløgunum var ein fyrilestur hjá Hans Mourits Foldbo um menning av barninum.

Hans Mourits greiddi frá, at siðbundna ástøðið um avgerandi týdningin av tveimum teimun fyrstu árunum hjá barninum skal takast við fyrivarni. Seinnu árini eru sálarfrøðingar komnir eftir, at uppvøkstur og umhvørvi hevur størri týdning enn higatil hildið.

- Ættleiðingarforeldur hava ofta havt ta fatan, at tað vendist ikki aftur, um eitthvørt álvarsamt ella óheppið er hent teirra ættleidda barni, áðrenn tey fingu tað. Ivaleyst ávirkar slíkt onkusvegna, men tað verður ikki longur fatað, sum ein ófrávíkiligur dómur yvir barnið, og tað uggar sjálvandi ættleiðingarfamiljur, sigur Poul Geert Hansen.

### Kunning

Ein av fremstu uppgávunum hjá felagnum verður at kunna um ættleiðing. Felagið hevur longu gjørt eina heimasíðu, har slóðir og adressir, umframt viðtøkur og endamál felagsins eru at finna. Eisini kunnu fólk seta felagnum spurningar umvegis heimasíðuna, sum hevur bústað á www.aettleiding.fo



STEPHANSSONS HÚS / UNI ARGE

## Einki at siga, hvussu stavað verður…?

**Roynið og lesið hetta, sum tey á Cambridge Universisty eru komin fram til:**

STAVSETING

»Smaærbt enii knnnaig á Cmabridge Uinervitisy, so bliar tað okni, husvu rðfayjgaln er á bkósvutanum í ourðum, men tað er tnngýardimiikð, at ftyrsi og sðsíti bkóvatusr eru á rutøtm pslsái. Retisn knan vrea ein huvlrisai, men oiðrni knunu konirti lsaest utatn trupukeilalr. Httea kmest av, at menskinaenjs hleii lseur ikki høvnn enisktaan bsótakv, men alt oðirð í snen«.



Karsten Hansen:

# Lønarvøksturin elvir til stórar eykajáttanir

**- Av tí at samgongan rindar fulla lønarkompensatión fyrstu hálvu í 2004 fyri lønarvøksturin á almenna arbeiðsmarknaðinum á 4,5%, eru stórar eykajáttanir og harvið størri hall á fíggjarlógini í væntu, sigur fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen**

FÍGGJARLÓG 2004
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Tá samgongan einki sparir fyrru hálvu í hesum árinum og má rinda allan lønarvøkstin á 4,5%, noyðist hon at spara tvífalt so nógv seinnu hálvu, um roknistykki skal hanga saman, og um stórar eykajáttanir ikki mugu takast í nýtslu, sigur fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen*

Tá fíggjarlógin fyri 2004 í seinastu viku var til viðgerðar í tinginum, gav fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen til kennar, at samgongan skjótt kemur í trupulleikar við tí roknistykki, sum gjørt er í sambandi við stóra lønarvøkstin á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Í fíggjarlógini 2004 stendur, at »full kompensatión ikki verður latin fyri stóru lønarhækkingarnar, sum eru umleið 4,5% árliga á almenna arbeiðsmarknaðinum. Meginreglan er, at 2% verða latin í lønarkompensatión«. Hini 2,5% mugu stovnsleiðarar so sjálvir útvega við sparingum.

### Samgongan útvegar skeiv tøl

Við tað at fíggjarlógin í ár er seinkað orsakað av nývalinum í januar, verður full lønarkompensatión á 4,5% latin fyrstu 5-6 mánaðirnar í 2004, áðrenn uppskot samgongunnar um at lækka lønarkompensatiónina niður í 2% kemur í tingið.

Hetta hevur fingið fyrrverandi fíggjarmálaráðharran Karsten Hansen at seta knyklar í brýr, tí sambært honum hevur samgongan ein trupulleika, sum í fyrstu syftu elvir til eykajáttanir og harvið størri hall enn tær 277 milliónirnar, sum higartil eru í undirskoti. Uppá longri sikt kunnu avleiðingarnar vera sjónligar uppsagnir á almenna arbeiðsmarknaðinum.

– Tá samgongan einki sparir fyrru hálvu í hesum árinum og má rinda allan vøkstin á 4,5%, noyðist hon at spara tvífalt so nógv seinnu hálvu, um roknistykki skal hanga saman, og um stórar eykajáttanir ikki mugu takast í nýtslu, sigur ein avgjørdur Karsten Hansen. Fyrrverandi kassameistarin í Fíggjarmálaráðnum vísir við hesum á, at nýtslan og útreiðslurnar uttan iva verða størri, enn samgongan í løtuni letst og upplýsir um.

– Tá samgongan seinnu hálvu av hesum árinum lækkar lønarkompensatiónina niður í 2%, skulu onnur 2,5% sparast í bert seks mánaðir, og tá uppsagnarfreistirnar á almenna arbeiðsmarknaðinum eru 3-6 mánaðir, er talan einfalt um ov stutt skotbrá til nakrar sparingar í 2004, vísir Karsten Hansen á. Tískil kemur fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin úr Tjóðveldisflokkinum til ta niðurstøðu, at hallið á fíggjarlógini við eykajáttanum má gerast væl størri enn tær 277 milliónirnar, sum nú eru í 2004, og hetta vil ABC-samgongan sambært honum ikki viðurkenna.

– Talan er sostatt um eitt undirskot á 2,5% fyrsta hálva árið hjá samgonguni, við tað at teir gjalda 4,5% í staðin fyri 2% av almennu lønunum, og hesar upphæddir eru ógjørligar at spara innaftur seinastu seks mánaðirnar, slær tjóðveldismaðurin úr Norðoyggjum fast.

Fíggjarmálaráðharrin:

# Roknistykkið hongur saman

**Bárður Nielsen fíggjarmálaráðharri sigur, at lønarhækkingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum verða fíggjaðar við lækkingum í teimum íløgum, sum ikki eru sáttmálabundnar. – Vit hava steðgað nógvum nýggjum virksemi orsakað av sparingum, sigur Bárður Nielsen**

FÍGGJARLÓG 2004
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Omanfyri finst fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen at núverandi samgongu fyri ikki at siga greitt, hvørjar avleiðingarnar eru av lønarvøkstrinum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Karsten Hansen vil vera við, at stórar eykajáttanir eru eitt krav, um samgongan skal megna at fíggja lønarhækkingarnar á 4,5% til starvsfólk á almenna arbeiðsmarknaðinum, og harvið verður talan um eitt enn størri hall á ársins fíggjarlóg.

### Íløgur hildnar aftur

Núverandi fíggarmálaráðharrin úr Sambandsflokkinum, Bárður Nielsen, sigur, at Karsten Hansen hevur sæð burtur frá teimum sparingum, sum longu nú eru settar í verk, og sum skulu útvega pening til fullu lønarkompensatiónina.

– Vit arbeiða í løtuni undir eini bráðfeingisfíggjarlóg, og tískil mugu vit gjalda fulla lønarkompensatión, men vit vinna hesar útreiðslur aftur við sparingum á íløguøkinum, sigur fíggjarmálaráðharrin. Bárður Nielsen vísir á, at fleiri av teimum tiltøkum, pengingur er játtaður til, verða av núverandi samgongu hildin aftur, og í hesum liggja sparingarnar.

– Nógv nýtt virksemi skuldi verið byrjað, sum vit hava valt at steðga, og við hesum spara vit í upphæddum, sum viga upp ímóti lønarvøkstrinum, sigur Bárður Nielsen.

Spurdur, á hvørjum ítøkiligum økjum nýggjar verkætlanir eru steðgaðar, er aftursvari frá fíggjarmálaráðharranum, at sparingar í íløgum eru gjørdar á øllum økjum, har bundnir sáttmálar ikki áseta játtanir við lóg.

– Sostatt vinna vit pening við at strika nakrar av teimum játtanum, sum nú eru samtyktar undir verandi bráðfeingisfíggjarlóg, og hesar sparingar fíggja fullu lønarkompensatiónina á 4,5% á almenna arbeiðsmarknaðinum, vit í løtuni gjalda, sigur Bárður Nielsen úr Fíggjarmálaráðnum.



*– Nógv nýtt virksemið skuldi verið byrjað, sum vit hava valt at steðga, og við hesum spara vit í upphæddum, sum viga upp ímóti lønarvøkstrinum á 4,5%, sigur Bárður Nielsen, fíggarmálaráðharri*